Frank Skytte:

# -Eg og Tofta Ítróttarfelag hóska ikki saman

**Danski venjarin hjá B68, Frank Skytte, gevst á Toftum eftir hetta kappingarárið**

VENJARASTARV
*Páll Holm Johannesen*



*Danski venjarin í B68, Frank Skytte, verður ikki ar síggja á Toftum komandi kappingarár. – Eg og Tofta Ítróttarfelag hóska ikki saman, sigur Frank Skytte í samrøðu við Sosialin*

- Eg og Tofta Ítróttarfelag hóska ikki saman, og tí veri eg ikki venjari hjá B68 komandi kappingarár, sigur Frank Skytte

Frank Skytte leggur tó dent á, at hann ætlar sær at gera arbeiðið á Toftum liðugt, og at tað verður arbeitt hart fram til 4. oktober, tá landskappingin endar.

Tá vit spyrja Frank Skytte nærmari um, hvørjar orsøkir gera, at hann og B68 ikki hóska saman, fortelur hann, at tað vil hann ikki útgreina, men at tað einamest er ting í gerandisdegnum rundan um felagið, sum gera tað, at samstarvið millum hann og B68 ikki hevur virkað til fulnar.

### Nýtt klausul

Sáttmálin hjá B68-venjaranum fevndi annars yvir tvey ár, men B68-leiðslan vildi hava ein klausul um, at báðir partar kundu siga sáttmálan upp eftir eitt ár, og tað er júst tað, Frank Skytte hevur valt at nýta.

- Tað var ikki eg, sum upprunaliga bað um klausulin, men B68-leiðslan, og nú er tað so eg, sum nýtið hann, sigur danski B68 venjarin.

Frank Skytte vísir á, at talan ikki er eina óverandi støðu á Toftum, men bara, at partarnar ikki eru samdir á fleiri økjum. Danski venjarin á Toftum metir ikki, at hann hóskar inn í bygdarmyndina á Toftum, og tað er bæði á tí persónliga og ítróttarliga økinum, og tá soleiðis er statt, er frægast fyri báðar partar at steðga samstarvið.

Frank Skytte boðaði B68-leiðsluni frá síni avgerð longu eftir dystin ímóti HB 7.juli, og tá var so ætlanin, at B68 skuldi almannakunngera avgerðina, men hetta varð ikki gjørt.

- Mín ætlan var, at B68-spælararnir skuldu fáa tað at vita eftir HB-dystin, so at tá vit møttust eftir summarfrítíðina vóru spælarar klárir yvir, at eg gavst við kappingarlok, men tað hetta hevur leiðslan ikki gjørt, og eg eri ikki heilt klárur yvir, um teir hava gjørt tað enn, tí mær vitandi eru tað spælarar í B68-hópinum, sum enn ikki vita av tí, at eg gevist, sigur Frank Skytte

Eftir dystin ímóti HB 7.juli, sum toftamenn taptu 3-1, hevur gingið rættiliga striltið. Liðið hevur leikt tveir dystir ímóti botnliðum, og báðir dystirnir eru endaðir við javnleiki. Fyrst var TB á Svangaskarði, og tann dysturin endaði málleysur, og vikuna eftir spældu toftamenn 3-3 á Mølini ímóti EB/Streymi.

Hevði B68 fingið fulla úrtøku úr teimum báðum dystunum, so høvdu teir ligið ovastir á stigartalvuni í dag saman við NSÍ, men nú liggja teir í staðin á einum sætta plássi í føroysku landskappingini.

Tó so, allar súðir er langt í frá syftar enn, og toftamenn eru framvegis við í stríðnum um FM-heiti, tí frástøðan til oddaliðið er ikki meir enn fýra stig.

Spurdur um arbeiðið hevur verið øðrvísi, síðan hann tók avgerðina at gevast á Toftum, svarar Frank Skytte, at tað hevur tað ikki verið, og leggur enn einaferð dent á, at hann er professionellur, og ætlar sær at gera arbeiðið liðugt á Toftum.

- Eg valdi at siga frá míni avgerð tíðliga, so B68 fekk góða tíð at leita sær eftir nýggjum venjara, og tað er ikki meir enn hóskandi frá míni síðu, sigur Frank Skytte.

Tá vit spyrja um tað er kuril á tráðnum millum seg á B68-spælararnar, svarar Frank, at har er als ongin kuril, og hann altíð mett seg sjálvan sum »spillernes mand«, sum hann sjálvur tekur til, og høvdu tað verið trupulleikar, so hevði hann varnast tað, vísir Frank Skytte á.

### Framtíðin

Spurdur um hann kundi hugsa sær at verið verandi í Føroyum, svarar Frank, at hann er opin fyri øllum møguleikum, og hann ikki kann útihýsa møguleikanum at framhaldandi at vera venjari í Føroyum.

- Nú hevur tað ikki verið almannakunngjørt, at eg verði leysur, so eg havi ikki verið í samband við nakað felag enn, men í míni 24 ára gomlu venjaratíð, havi eg aldrin sjálvur søkt eitt venjarastarv, so eg eri ikki bangin fyri at ganga arbeiðsleysur komandi kappingarár, greiðir Frank Skytte frá.

Hvussu verður við danska framherjanum í B68, Anders Nygaard, komandi kappingarár, veit Frank Skytte ikki at siga, men Anders Nygaard hevur fylgt Frank Skytte seinastu fýra árini, og tí kann væl hugsast, at hann eisini verður í tí felagi, sum Frank Skytte velur at venja komandi kappingarár.

Frank Skytte hevur venjari seinastu árini verið venjari í bæði Glostrup og Hvidovre, og í báðum feløgum var Anders Nygaard við, og nú leiðin gekk til Føroya, fylgdi danski framherjin í B68 eisini við Frank Skytte.

# AB-Cup 2002

**Argja Bóltfelag skipaði fyri stórari ungdómskapping í summarfótbólti á Argjum 9.-11. august. Tilmeldaði vóru 43 lið og avgreiddir 90 dystir**

Tíðindaskriv

Tað er ikki vanligt við summarfótbólti í Føroyum. Nærum allir ungdómsleikarar í fótbólti liggja stillir í bestu tíð á árinum at leika fótbólt. Tað er stórt spell, tí summarfótbóltur átti at verið tikin í størri álvara.

Í t.d. Danmark er ein ørgrynna av fótbóltskappingum um summarið

AB-Cup varð fyri 4.ferð fyriskipað á Argjum. Hetta er ein ungdómskapping í summarfótbólti nú beint áðrenn kappingarnar byrja eftir summarfrítíðina. Kappingin í ár varð avgreidd í allarbesta summarveðri og heili 43 lið høvdu boðað frá luttøku til kappingina.

### Tað eru 11 lið fleiri enn í fjør

Leiktir vórðu 90 dystit. Byrjað varð fríggjakvøldið, og hildið var á allan leygardagin, og sunnudagin kl.16.30 vórðu síðstu dystirnir leiktir. Lutakararnir vóru væl nøgdir við fyriskipanina av kappingini.

Vinnandi liðini vunnu ognarsteyp, og nr.1, 2, 3 vunnu heiðursmerki

### Vinnararnar av kappingini vóru:

Pinkulingar: TB
Smápiltar: TB
Piltar: AB
Smádreingir: B36 2
Dreingir: VB
Pinkur: AB
G. 10-12: AB
G. 12-14: TB
G. 14-17: HB

Argja Bóltfelag takkar stuðulunum av kappingini, ið vóru: P/F Poul Michelsen, Føroya Bjór, MBM, Trygd, Elding, Føroya Sparikassi, Føroya Banki og Smyril Line.

**Vegna plásstrot koma myndirnar av vinnarunum í AB-Cup 2002 í blaðið í morgin**



**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2375, Sp/f Sammut, 700 Klaksvík.

Viðtøkur broyttar: 29.01.2002.
Nýtt navn: Sp/f Eystís

Skráseting Føroya tann 21. august 2002

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 3, P/F Skipafelagið Føroyar, 100 Tórshavn.

Nevnd:
Farin úr nevndini: John Sjúrður Olsen Dam, Hvítanesvegur 17, 188 Hoyvík og Hinderikus Lamain, Irisvej 12, DK-2970 Hørsholm.

Skráseting Føroya tann 21. august 2002

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2471, P/F Hansen Seafood, 490 Strendur.

Viðtøkur broyttar: 07.06.2002.
Nýtt navn: P/F Faroe Fresh Fish Co
Nýggj hjánøvn: P/F FFF (P/F Faroe Fresh Fish Co) og P/F Hansen Seafood (P/F Faroe Fresh Fish Co)
Nevnd:
Farin úr nevndini: Kári Hansen, 490 Strendur (formaður)
Innkomin í nevndina sum formaður: Sóleyð Debes Joensen, 490 Strendur.

Skráseting Føroya tann 21. august 2002

Kristin Balle

---




- Landarar!!!

P/F SNODD · Toftum, søkir eftir fólki, at landa og til annað fyrifallandi arb., brúk er fyri røskum og dugnaligum fólkum at byrja beinanvegin.

Áhugaði kunna venda sær til:

Skrivstovuna 44 99 94
Dánial 21 25 60
Jóhannus 21 70 60



www.SNODD.fo

Tel. +298 44 99 94 - Fax. +298 44 91 19 - e-mail. snodd@snodd.fo




## Til sølu

**Skjóttgangandi bátur til sølu**

Typa: DORY 17 (17 føtur)
Leysamotur JOHNSON 80HK
Bátavognur verður seldur við bátinum.

**Annað til sølu**

Leysamotur JOHNSON 90HK
Blandimaksina (stór)
Slamsúgvari

Bátur o.a. kunnu síggjast hjá SLV – Vága Floghavn og *verða seld um hóskandi boð fæst.*

Skrivlig boð stílað til Statens Luftfartsvæsen, Vága Floghavn, FO-380 Sørvágur, skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 8. september 2002.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja á tlf. 354400 ella 354410.

**Statens Luftfartsvæsen**
Vagar Lufthavn

## Assistentur

Søkt verður eftir avloysara fyri assistentin á Setursskrivstovuni á Fróðskaparsetrinum frá 15. sept. ella skjótast til ber. Starvið er tíðaravmarkað í eitt ár.

**Uppgávur**
- Post og telefonavgreiðsla.
- Bóking og umsiting av forskotskassa
- Skráseting og viðlíkahald av ymsum yvirlitum og uppgerðum
- Ljóstøka
- Ganga til handa

**Førleikakrøv**
Arbeiðið er sera fjølbroytt. Krøv verða tí sett til:
- røkjuskap
- evni at arbeiða sjálvstøðugt
- evni at samskifta og samstarva við onnur
- góðan málkunnleika
- góðan edvkunnleika

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið og lønt í flokki II.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Anniku Sølvará, setursskrivara, á telefon 352500 ella teldupostadressuni: annikas@setur.fo

Umsókn við avriti av prógvum, váttan um arbeiðsroyndir, viðmælum o.l. verður at senda setursskrivstovuni í seinasta lagi 9. september 2002.

Fróðskaparsetur Føroya
**Setursskrivstovan**
J. C. Svabos gøtu 14
Postrúm 272
110 Tórshavn

*Fróðskaparsetur Føroya er útbúgvingar- og granskingarstovnur, sum hevur tríggjar deildir umframt Setursskrivstovuna. Setursskrivstovan er miðfyrisitingin hjá Fróðskaparsetrinum. Í løtuni starvast 8 fólk á skrivstovuni.*





## TIL SØLU

**Fiat Ducato 2.8TD** – 15persóna bussur, árgang 2001, koyrt 24.000 km.

**Skála Kommuna**
**tlf. 441179**